# Open by night

**Í kvøld hava handlarnir í Klaksvíkar Handilsfelag opið til klokkan 23. Hetta er eitt afturvendandi tiltak, sum Handilsfelagið skipar fyri**

HANDILSLÍV
*Solby A. Eliasen*



*Fríggjakvøldið hava handlarnir í Klaksvíkar Handilsfelag opið til klokkan 23*

**Klaksvík:** Formaðurin í Klaksvíkar Handilsfelag Jógvan Jacobsen, sigur, at tað er ójavnt, hvussu vær umtókt eitt tílíkt tiltak er millum limirnar. Summi lata væl at, meðan onnur lata minni væl at.

- Men soleiðis vil tað altíð verða, sigur Jógvan.

Hetta tiltakið varð roynt tvær ferðir í fjør, og tað hevur víst seg at eydnast rímuliga væl. Jógvan Jacobsen sigur, at um tað fellur á ein góðveðursdag, so kann tað vísa seg at verða sera hugnaligt.

Onkuntíð hava handlar eisini skipað fyri onkrum serligum tiltaki í sambandi við Open by night ella langan leygardag. Til dømis hava handlar skipað fyri mótasýning úti og eisini hevur verið høvi til at fáa ein kaffimunn uttandura.

Jógvan Jacobsen sigur, at handlarnir koyra eisini ofta onkur serlig tilboð í sambandi við tílíkar dagar, og tað er ofta avgerandi fyri undirtøkuna eisini.

Klaksvíkar Handilsfelag tilrættisleggur tiltøk fyri eitt hálvt ár í senn. Og so verður ætlanin løgd fyri limirnar á fundi, og so verður atkvøtt um tað.

Fyrst umhugsaðu tey at hava langan leygardag í hesi vikuni heldur, men orsakað av at seinasti dysturin í landskappingini í fótbólti verður leygardagin, so hava tey heldur valt at hava Open by night.

- Nú er tað so greitt, at HB er føroyameistarar, men tað vistu vit ikki, tá vit gjørdu av at hava Open by night heldur enn langan leygardag. Tað verður konfirmatión sunnudagin, og tað er kanska serliga við tí fyri eyga, at tað verður skipað fyri hesum tiltakinum. Og eftirsum at seinasti dystur er leygardagin, so kundi tað væntast, at undirtøkan ikki fór at verða so góð. Tí valdu vit heldur at geva fólki ein møguleika til at keypa seint fríggjakvøldið, greiðir Jógvan Jacobsen frá.

Hann leggur at enda afturat, at tá tað hevur verðið skipað fyri tiltøkum í býnum í sambandi við tiltøk hjá Handilsfelagnum, at tá eru tað handlarnir sjálvur, sum skipa fyri tí og ikki Klaksvíkar Handilsfelag, sum tað onkuntíð hevur verið hildið.

# KÍ takkar áskoðarunum

**Eftir seinasta dystin í landskappingini hjá fyrstu deild við monnum leygardagin í Klaksvík, bjóðar KÍ øllum áskoðarunum til ábit í KÍ høllini**

FÓTBÓLTUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tá KÍ og NSÍ hava leikt dystin um silvur og bronsumerkini leygardagin, og heiðursmerkini eru handaði, bjóðar Klaksvíkar Ítróttarfelag øllum áskoðarunum til ábit í KÍ høllini.

Karl Birgir Isaksen, formaður í Fótbóltsdeildini hjá KÍ, sigur, at áskoðararnir, sum so trúfast møta til hvønn dyst, verða ofta gloymdir, tá kappingarárið er av. Tí hevur leiðslan í KÍ tikið hetta stigið.

- Hetta er líkasum fyri at vísa okkara takksemi til áskoðararnar. Og vit vóna, at tey á henda hátt fara at kenna tað, sum tey eru ein partur av felagnum. Tí tað eru tey so avgjørt. Uttan teirra stuðul, so hevði felagið mangan verið lítið, tað er púra vist, sigur Karl Birgir.

Til matna leygardagin í KÍ høllini verður smyrjibreyð, køkur frá bakarunum í Klaksvík og kaffi. Eisini verður góðgæti frá JFK Heilsølu og sodavatn frá Føroya Bjór.




*Eftir seinasta landskappingardystin hjá monnum leygardagin fáa áskoðararnir høvi til at fáa ein bita, sum eina tøkk fyri stuðulin í farna kappingarárinum*

# Kvinnufelagsársaðalfundur

**Kvinnufelagið hevði ársaðalfund mánakvøldið 30. septembur**

YVIRLÝSING
*Solby A. Eliasen*

Í tíðindaskrivinum stendur, at ársaðalfundurin hjá Kvinnufelagnum, ið varð hildin í Mettustovu mánakvøldið 30. septembur 2002, samtykti at senda fjølmiðlunum fylgjandi yvirlýsing:

Mangt leikar á nú føroyska samfelagið í royndum sínum at koma longur fram á leiðini ímóti einum liviligari samfelag fyri øll uttan mun til kyn ella húðalit, til religión ella kynsliga orientering millum vaksið fólk tykist at vera komið í rasshaft av at blanda politikk og átrúnað saman.

Vit gera tí vart við, at
- Kvinnufelagið av fullum huga tekur undir við samtyktum ST´s um rættindini hjá kvinnum at ráða yvir sínum egna kroppi í øllum viðurskiftum sum viðvíkja heilsu og nøring, kynslívi og familjumynstri, og at hesin rættur eisini eigur at umfata samkyndar menn.

Vit gera eisini vart við, at
- Kvinnufelagið tekur undir við yvirlýsingini um skrásett paralag fyri samkynd í Føroyum, og at
- Kvinnufelagið somuleiðis ynskir lógartryggjaðan rætt hjá kvinnum til sjálvvalda fosturtøku.



# Hýsa 3 fer fyri spottprís

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í samrøðu við Sosialin herfyri, segði Olaf Olsen, nevndarformaður í Fiskamarknaði Føroya, at við uppboðssøluni kom »marknaðarprísurin til skipini«.

Tá ið tú hevur við fisk og fiskivinnu at gera, er alt ikki so einfalt. Tí eru altíð undantøk, og soleiðis er eisini í hesum førinum.

Útróðrarmenn, sum royna við línu og fáa væl av hýsu, eru ikki nøgdir við prísin á teirri smáu hýsuni, hýsu 3.

Summar dagar hevur prísurin fyri hýsu 3 ligið heilt niðri á 1 kr. fyri kg., og tað er snøgt sagt eingin prísur. Aðrar dagar hevur hann verið betur, upp í einar 5-7 kr. fyri kg.

Tað eru serliga teir, sum selja hýsuna óvirkaða av landinum, sum keypa hendan fiskin. Hýsan verður ísað og send niður á bretska marknaðin.



*Marknaðarprísurin á teirri smáu hýsuni er eftir øllum at døma ikki »komin til skipini«. Hýsa 3 fer stundum fyri spottprís á uppboðssøluni, men verður seld óvirkað av aftur landinum fyri góðan prís.*

### Spottprísur inn, góður prísur út

Sosialurin hevur frætt frá álítandi keldu, at prísurin, sum fæst á bretska marknaðinum, líkist als ikki prísinum, sum bátarnir fáa á uppboðssøluni.

Vit hava skilt, at onkran dagin er hýsa keypt á uppboðssølu fyri 1 kr. fyri kg. og seld av aftur landinum fyri einar 15-17 kr. fyri kg.!

Hetta er ein himmalvíður prísmunur…

Fyrr í ár tosaði stjórin í Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen, um at lagað virkið í Álakeri, sum Bjarti Mohr rak, um til eitt virki, sum kundi keypa og virka smáan fisk, sum stundum fer av landinum fyri lítið og lætt.

Í hesum sambandi skiltu vit á Meinhardi, at hann ikki minst hugsaði um smáu hýsuna, sum fer óvirkað av landinum.

Seinast, vit frættu frá Meinhardi um hesa ætlan, var hon ikki komin undir land.

# Nógvur upsi á marknaðinum

**Prísurin er tó rímiliga støðugur; hann liggur um 5 kr. í miðal fyri kg.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er rættiliga nógvur upsi á føroyska marknaðinum í løtuni, men hóast tað, so hevur miðalprísurin hildið sær hampiliga væl. Tann størri upsin fer fyri góðar 5 kr. fyri kg. og tann smærri fyri slakar 5 kr. Miðalprísurin liggur tískil rundan um tær 5 krónurnar.



*Skip koma og skip fara. Nógvur upsi verður førdur til lands í hesum døgum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Nógvar landingar

Virkini, sum arbeiða upsa, hava úr at gera.

Mánadagin landaði Vesturskin út við 200.000 pund í Saltangará, harav sløk 160.000 pund var upsi. Mikudagin var Vesturvarði; teir høvdu eini 180.000 pund tilsamans, harav 140.000 pund var upsi.

Aftrat hesum hevur Fiskavirking í Saltangará keypt eini 25.000 pund av upsa frá Magnusi Heinason og eini 40.000 pund frá P/F Beta.

Væntandi landa tvey skip í Saltangará í dag. Tá ið vit frættu, var ikki endaliga greitt, um skipini verða Akranes og Dragasund ella Akraborg og Varðborg.

– Vit fáa annað av hesum pørum hendanvegin, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari

Trolbáturin, Niclas, landar eisini í Saltangará í dag, men tað verða onnur virki, sum keypa hendan fiskin, tí væntandi er meginparturin av veiðini gráur fiskur.

### Trýstir prísin

Jason Johannesen sigur, at marknaðarprísurin á upsa er einki serligur í løtuni, og tað trýstir eisini prísin á upsablokki, tá ið nógvar upsalandingar eru uttanlands.

# Seyðasøla, køkutombola, matsøla og dansur

**Kappróðrarfelagið, NSÍ, skipar fyri stórum tiltaki í Ítróttarhøllini í Runavík, leygardagin, 19. oktober**

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*



*Í Runavík verður nógv á skránni leygardagin, 19. oktober. Hendan dagin skipar kappróðrarfelagið, NSÍ, fyri seyðasølu, stórum køkutombola, matsølu og seinni um kvøldið eisini fyri dansi við norsku, Anitu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Leygardagin, 19. oktober, skipar kappróðrarfelagið, NSÍ, fyri uppboðssølu av seyði í Ítróttarhøllini í Runavík. Hetta hevur verið eitt vælumtókt tiltak, sum felagið tekur uppaftur í ár. Seyðasølan byrjar kl. 14.

Kappróðrarfelagið fer at selja einar 15 seyðir á uppboði, og síðan verður eisini ein veðrur seldur á »meksikanskan hátt«, sum felagið tekur til. Her verða 50 kr. goldnar fyri hvørt boð, sum kemur.

Í samband við seyðasøluna, verður eisini skipað fyri stórum køkutombola og matsølu.

### Contry dansur

Men tiltøkini hjá kappróðrarfelagnum, leygardagin, 19. oktober, verða ikki avblást við køkutombola og matsølu, tí leygarkvøldið verður eisini dansur á skránni.

Frá kl. 23 til 04 verður contry dansur í Ítróttarhøllini við norsku, Anitu, sum fer at undirhalda saman við faðiri sínum.

Anita er vælumtókt á Bergen-leiðini í Noregi, og í Runavík fer hon at undirhalda við góðum dansitónleiki.

Kappróðrarfelagið, NSÍ, vónar, at nógv fólk fara at leggja leiðina fram við Runavíkini leygardagin til seyðasøluna og seinni um kvøldið til contry dansin.